# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## HVS-handverkari

Eitt tíðaravmarkað starv sum HVS-handverkari á Teknisku deild er leyst at søkja til setan 1. oktober 2007 ella skjótast gjørligt til og við 30. september 2008.

**Starvið fevnir m.a. um eftirlit og umvælingar av:**
- ventilatiónsverkum og reinsiverki
- hita- og dampskipan
- køks- og vaskaríútgerð
- køli- og frystiskipanum
- luft- og gassskipanum
- ávaringarskipanum til eld og annað
- sterilisatións- og disinfektiónsútgerð

**Førleikakrøv**
- útbúgving sum handverkari innan maskinfakið
- kunnleiki til stýrings- og reguleringsskip anir
- góð samstarvsevni
- gott tænastusinni
- gott handalag
- góður røkisskapur

Landsjúkrahúsið nýtir CTS-skipan & Maximo viðlíkahaldsskipan.

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og fjølbroytt starv
- fakliga kompetentar, góðar og virknar starvsfelagar

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja 304536 til Jóan Símun Saltá, leiðara á maskinverkstaðnum, jss@lsh.fo ella til Suna Rasmussen, tekniskan leiðara, telefon 304538, sr@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 24. september 2007 kl. 12.00.

## Ergoterapeutur

Til okkara vælvirkandi toymi av ágrýtnum og positivum starvsfeløgum á Ergoterapiin á psykiatrisku deild søkja vit eftir ergoterapeuti at byrja 1. oktober 2007 ella skjótast gjørligt. Starvið er eitt fast starv á 34 tímar um vikuna.

Vit bjóða tær eitt arbeiðspláss í stórari menning, har tú fært møguleika fyri fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Um arbeiði:**
Ergoterapiin viðger brúkarar frá øllum psykiatriskum deildum umframt ambulantar brúkarar. Vit arbeiða sentralt í ergoterapiini, og ergoterapeutarnir hava ábyrgdina av hvør sínari deild.

Vit bjóða tær eitt spennandi starv, har arbeiðsuppgávurnar eru sera fjølbroyttar. Vit nýta m.a eina kanadiska fyrimynd sum fatanargrundarlag, og arbeitt verður nógv við dokumentatión.

**Ergoterapeuturin**
Skal vera áhugaður í at luttaka í einari spennandi avbjóðing, kunna vísa áræði, vera opin fyri nýggjum tiltøkum, og sum vil verða við til at útbyggja tað tvørfakliga samstarvið við aðrar fakbólkar. Vit leggja dent á persónligar eginleikar, so sum fleksibilitet, greiða talu og humor.

**Nærri fæst at vita** um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a við at venda sær til Súnu Mørk, deildarergoterapeut, tlf. 304500, lokal 5785 og 5786 ella til Kirstin Ellingsgaard, leiðandi ergoterapeut, tlf. 304500, lokal 5781.

**Umsóknarfreistin er** 24. september 2007 kl. 12.00

## Onnur størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðfeingisdeildina G1**
Umsóknarfreistin er 9. september 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Føðideildina A2**
Umsóknarfreistin er 14. september 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B7**
Umsóknarfreistin er 17. september 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Hjartarehabiliteringina**
Umsóknarfreistin er 17. september 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til G3, onk.amb.**
Umsóknarfreistin er 17. september 2007 kl. 12.00

**Læknaskrivarar til Medisinska depilin**
Umsóknarfreistin er 17. september 2007 kl. 12.00

**Leiðandi læknaskrivari til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 19. september 2007 kl. 12.00

**Læknaskrivari til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 19. september 2007 kl. 12.00

**Læknaskrivari til Bráðdepilin**
Umsóknarfreistin er 19. september 2007 kl. 12.00

**Leiðsluskrivari til Bráðdepilin**
Umsóknarfreistin er 19. september 2007 kl. 12.00

**Ljósmøður**
Umsóknarfreistin er 21. september 2007 kl. 12.00

## Sálarfrøðingur

Á Psykiatriska deplinum er eitt fulltíðarstarv leyst at søkja hjá kliniskum sálarfrøðingi til setan 1. november 2007 ella eftir nærri avtalu. Talan er um starv, ið eisini fevnir um granskingaruppgávur.

Psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum er fyri alt landið og hevur 60 seingjarpláss við umleið 300 innleggingum árliga. Harumframt er dagdeild og stórt ambulant/økispsykiatriskt virksemi. Psykiatriski depilin hevur eisini tilsýnstænastu á øðrum sjúkrahúsdeildum umfram ávísa embætisskyldu úteftir, t.d. mentalobservatiónir o.a.

**Vit vilja fegin, at tú hevur:**
- cand. psyk. ella tilsvarandi útbúgving. Umsøkjarar við sergrein í kliniskari sálarfrøði við spesialist-góðkenning og supervisjónsførleika hava fyrimun
- hollan førleika og royndir í at fremja psykodiagnostiskar kanningar
- góð samstarvsevni, ídni, hug og dirvi til at luttaka í einum sera fjøltáttaðum diagnostiskum og viðgerðarligum arbeiði saman við øðrum fakbólkum
- førleika og royndir til at fremja sjálvstøðugt psykoterapeutiskt virksemi innan nógvar ymsar viðgerðaruppgávur
- verða við til at skipa fyri og samskipa gransking í psykiatriskum spurningum í Føroyum
- fyrimunur er, um tú skilir, tosar og skrivar føroyskt
- kandidatar uttan spesialistgóðkenning og supervisjónsførleika kunnu eisini søkja

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og mennandi arbeiðsøki við møguleika fyri viðkomandi skeiðum og fakligari kvalifisering
- dynamiskt samstarv í tvørfakligum eindum
- fjølbroyttar arbeiðsmøguleikar bæði á Psykiatriska deplinum og uttanfyri í samstarvi við aðrar skipanir og deildir innan almanna- og heilsuverkið

**Nærri upplýsingar**
um starvið fáast við at venda sær til læknafakliga depilsleiðaran á Psykiatriska deplinum, Tormóð Stórá, telefon 304500, lokal 4100, teldupostur: tost@lsh.fo ella til leiðandi sálarfrøðing Hera Krages-teen, lokal 4150, teldupostur: hekr@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 22. oktober 2007

## Leiðandi fysioterapeutur

Á Landssjúkrahúsinum er eitt fast fulltíðarstarv sum leiðandi fysioterapeutur leyst at søkja til setan 1. oktober 2007 ella eftir avtalu.

Vit sóknast eftir einum fólki, sum hevur hug og evni at leiða bólkin, sum eru 1 deildarfysioterapeutur, 12 fysioterapeutar og 1 sjúkrahjálpari.

**Starvið fevnir um:**
- dagliga leiðslu á fysioterapideildini
- ábyrgd av fakligari menning
- ábyrgd av fíggjarjáttan á deildini

**Vit bjóða tær:**
- eitt avbjóðandi og spennandi starv við møguleika fyri ávirkan
- samstarv við positivar og engageraðar starvsfelagar
- møguleika fyri persónligari og fakligari menning
- eitt mennandi og dynamiskt arbeiðsum hvørvi

**Vit vænta, at tú hevur:**
- góð leiðaraevni
- góð samstarvsevni
- hug og evni at menna fysioterapi deildina
- evni at umsita og náa mál
- evni at motivera, raðfesta og útdelegera

**Krøv til umsøkjaran:**
- útbúgving sum fysioterapeutur við góðkenning
- leiðsluroyndir

Fyrivarni má takast fyri møguligum bygnaðarbroytingum.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja 304500 til Hervør Eyðinsdóttir, deildarfysioterapeutur, lokal 5797 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 6102.

**Umsóknarfreistin er** 24. september 2007 kl. 12.00.

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo